# Eigari & leiðari

# Ert tú okkara nýggja andlit?

Vit leita eftir tí rætta persóninum til leiðarastarvið í Inn við Streymin. Tann ið vit meta best skikkaðan til starvið gerst samstundis partaeigari í Inn handlinum í Norðskála og partur av Inn samtakinum í Føroyum. Inn hevur í dag tríggjar stórar matvøruhandlar. Ein í Klaksvík, ein við Streymin og ein í Havn. Fjórði Inn handilin letur upp í Tórshavn í næstum.

Tað eru tríggjar meginreglur ið vit fyrihalda okkum til tá vit velja at gera leiðaran í handlinum til partaeigara:

Fyri tað fyrsta vil eigarin, alt annað líka, hava tað størstu motivatiónina til at veita tí einstaka viðskiftafólkinum bestu tænastuna. Og tað er nú einaferð so at viðskiftafólkið í síðsta enda er tann ið skal gjalda okkum okkara løn.

Fyri tað næsta, meta vit, at eigarin vil vera tann ið samtakið hevur minst tørv á at umsita. Hetta tí, at eigarin vil altíð hava størstu motivatióna fyri at tryggja sítt egna.

Fyri tað triðja, vænta vit, at eigarin vil veita størri stabilitet í handlinum. Ein ið eigur í og trívist, vil alt annað líka, ikki hava so stóran áhuga til at skifta til annað starv.

Tað er ikki neyðugt at hava fíggjarliga orku fyri at gerast leiðari/partaeigari í Inn handlinum við Streymin. Fyri okkum er tað týdningarmest at finna tann persónin ið best kann røkja áhugamálini hjá tí einstaka viðskiftafólkinum og tryggja eitt gott samstarv við Inn samtakið.

Kanska er tað júst tær ið vit leita eftir. Leiðarastarvið í einum stórum matvøruhandli, inniber allar tær avbjóðingar og upplivingar ið nú einaferð eru at finna í einum starvi har so at siga allar hugsandi og óhugsandi støður mynda gerandisdagin. Tað krevst av tær at tú hevur førleikan, ert málsøkin og hartil hevur viljan at røkka dagliga málsetningin. Starvið er vællønt.

Umsóknir við møguligum prógvum/viðmælum verða at senda til Inn Sundsvegur 6 FO-100 Tórshavn innan 15. apríl 2008. Starvið verður sett í seinasta lagi 1. juni 2008.

Ynskjast upplýsingar um starvið, kann ringjast til Jaspur Johannesen tlf. 235200. Allir fyrispurningar/umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði



INN er eitt samtak við trimum stórum matvøruhandlum. Fyrsti handilin lat upp í Norðskála í 2003, næsti lat upp í Klaksvík í 2006 og tann triðji lat upp í Tórshavn somuleiðis í 2006. Fjórði INN handilin letur upp í Tórshavn í næstum. Umframt matvøruhandlarnar INN hevur samtaki eisini onnur áhugamál.

inn

**Klaksvík tel 455003 • Norðskáli tel 47 40 00 • Tórshavn tel 31 37 31**